# Bygdarráðsfundur

## Hvalbiar Kommuna

**Dagfesting:** 22.06.2020 kl. 17.30

Á fundi: Janus Thomsen
Eir J. Norðberg
Magni Bertholdsen
Niels Olaf Eyvindsson
Gunnhild Mortensen
Rúni Thomsen
Sten Spange Larsen

Skrivari: Johanna B. Djurhuus

1. **Innkomin boð uppá jørð til at heysta 2020.**
   Innkomnu boðini eru:
   **Støðlarnar – matr nr. 390f:**
   2 boð
   **í Sondunum – matr. nr. 145a:**
   2 boð
   **Avgerð:**
   Samtykt varð einmælt at leiga jørðina til hægstbjóðandi.

2. **Innkomin tilboð uppá skúlabarnaflutning innan kommunu.**
   Tá freistin fyri at lata inn tilboð uppá skúlabarnaflutningin var úti, vóru tvey tilboð innkomin.
   **Avgerð:**
   Einmælt samtykt at bjóða koyringina út av nýggjum, grundað á ov fá innkomin tilboð.

3. **Umrøða trupulleika av seyði.**
   Trupulleikin av, at seyður gongur í bønum um summarið, hevur verið til stóran ampa seinastu árini.
   **Trivnaðarnevndin 17.06.2020:**
   Nevndin hevur viðgjørt henda trupulleika og er samd um at arbeiða víðari við hesum.
   **Avgerð:**
   Einmælt samtykt at geva Trivnaðarnevndini heimild at arbeiða víðari við málinum við m.a. at tosa við hagastýrini.

4. **Reglugerð fyri nýggja bátahylin – umsókn um bátapláss.**
   Vega- og havnanevndin hevur gjørt eina reglugerð fyri nýggja bátahylin og umsókn um bátapláss. Gjaldið fyri bátaplássini liggur frá kr. 1.200,00 til kr. 4.200,00 árliga.
   **Avgerð:**
   Samtykt varð einmælt at taka undir við reglugerðini og umsóknarblaðnum.

5. **Innkomin tilboð uppá útgerð til bátabrúgvar.**
   Innkomnu tilboðini uppá tøl/nummarspjøldur til bátabrúgvarnar eru frá:
   S.J.H. Commercial Divers: kr. 26.900,00 uttan MVG
   Valdemar Lützen heilsøla: kr. 16.500,00 v/MVG
   **Vega- og havnanevnd 18.05.2020:**
   Nevndin mælir til at taka av tilboðnum uppá 40 stk. nummarspjøldur úr rustfríum stáli frá Valdemar Lützen kr. 16.500,00 v/MVG.
   **Fíggjarnevndin 22.06.2020:**
   Samtykt varð við tveimum atkvøðum fyri at taka av tilboðnum frá Valdemar Lützen.
   **Avgerð:**
   Samtykt varð einmælt at taka av tilboðnum frá Valdemar Lützen.

6. **Umsókn um byggiloyvi á matr. nr. 48k, Hvalba.**
   Søkt verður um loyvi til aftratbygging á matr. nr. 48k. Jens Chr. Joensen hevur viðgjørt umsóknina.
   **Tekniska nevnd:**
   Nevndin mælir til at geva byggiloyvi sambært hjáløgdu treytum.
   **Avgerð:**
   Samtykt varð einmælt at geva byggiloyvi til aftratbygging á matr. nr. 48k sambært umsókn, givnum upplýsingum og tekningum, treytað av, at byggingin verður framd í fullum samsvari við hjálagda byggiloyvi og BK17.

7. **Ikki almenn mál.**

Fundarbókin lisin og skrivað undir. Fundur lokin kl.20.30

Janus Thomsen Eir J. Norðberg Magni Bertholdsen Niels Olaf Eyvindsson

Gunnhild Mortensen Rúni Thomsen Sten Spange Larsen